# Føroyska sildin fyrimun á marknaðinum

Føroyska sildin er stór, og tey norsku virkini hava bara smáfallandi sild á goymslu. Tað kemur Kollafjord Pelagic til góðar.

Sildin, sum tey føroysku nótaskipini fáa, er bæði stór og feit. Tann sildin, sum vigar meiri enn 350 gram, verður heilfryst, meðan hitt verður skorið til flak. Arbeitt verður í tveimum vaktum, og 30 fólk eru á hvørjari vakt.

Ivan Fossabrúgv, søluleiðari á Kollafjord Pelagic, segði um vikuskiftið við Portalin, at í løtuni hevur virkið í Kollafirði ein fyrimun fram um norðmenn á marknaðinum. Norsku virkini hava bara smáfallandi sild eftir á goymslu, og norsku skipini fara ikki á sild aftur fyrr enn í september. Tí er tað ein fyrimunur fyri virkið í Kollafirði, at tað hevur atgongd til stóra sild hesa tíðina, sigur Ivan Fossabrúgv.



*Talan er um góða og feita sild, sum føroysku nótaskipini hava fingið í ein landnyrðing úr Føroyum*

Og virkið í Kollafirði hevur fingið nógva sild seinastu tíðina. Seinastu dagarnar hava Saksaberg, Finnur Fríði og Jupiter landað á leið 1.500 tons tilsamans. Fyrr í mánaðinum hava somu skipini – umframt Høgaberg – landað til saman s 1.400 tons.

Tey føroysku nótaskipini fáa sildin í landnyrðing úr Føroyum og á Sandoyarbankanum, og tað er helst tikin um, at Norðhavssildin hevur tikið tað gamlað ferðamynstrið uppaftur.

**-árni**

# Eldur á Havborg

Verksmiðjan á rækjutrolaranum Havborg fekk munandi skaða av eldi fríggjanáttina.

Havborg hevði landað 300 tons av rækjum í Kalvfjord nærhendis Tromsø, tá eldur kom í verksmiðjuna.

Nakrir av manningini vóru umborð, og tveir teirra lógu og svóvu, tá hinir varnaðust nógvan royk frá verksmiðjuni. Tað eydnaðist monnunum at sleppa í land í øllum góðum, og sløkkiliðið kom á staðið og sløkti eldin.

Tummas Justinussen, reiðari, sigur, at verksmiðjan hevur fingið so mikið stóran skaða, at skipið missir ein túr. Norsku skipasmiðjurnar hava so mikið nógv at gera, at tær hava ikki stundir til at umvæla skaðan, og tí kemur Havborg til Føroya, her skaðin skal umvælast.

Tað er greitt, at eldurin stóðst av einum skammlopi í elskipanini, sigur reiðarin.

– Men tað var heppið, at tað hendi, meðan skipið lá inni, tí annars kundi verið verri vorðið, sigur Tummas Justinussen.

– Hatta var ikki tað, sum vit høvdu brúk fyri, sigur Tummas Justinussen, reiðari. Eitt er, at eldurin gevur reiðarínum eykaútreiðslur, men skipið missir eisinmi ein túr, sigur hann.

Havborg hevði 300 tons hendan túrin. Tað hevur borið til higartil, men tað skal nógv til, tí oljuprísurin fer bara uppeftir, sigur Tummas Justinussen.



*Tað kemur sum vera man illa við hjá reiðarínum, at eldur kom í Havborg fríggjanáttina*





Shell søkir eftir nýggjum leiðara til tær báðar Shell-støðirnar í Havn
- við Norðara Ringveg og á Frælsinum.
Leiðarin hevur fulla ábyrgd
av dagligu leiðsluni og rakstrinum av Shell-støðunum
Talan er um eitt avbjóðandi, ábyrgdarfult og sjálvstøðugt starv,
har tann rætti persónurin hevur góðar møguleikar at seta sín egna
dám á tær báðar støðirnar í samstarvi við leiðsluna hjá Føroya Shell.

**Vit ynskja ein persón, sum er royndur innan handil og annars hevur hesar egin-leikar:**

- Leiðslusinnaður
- Ágrýtin
- Tænastusinnaður
- Fleksibul
- Samstarvssinnaður
- Álítandi
- Jaligur og opin
- Røkin

Løn sambært avtalu

Áhugað kunnu venda sær til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara, á telefon 347400 ella fartelefon 216899.

Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði og skulu í seinasta lagi mánadagin 21. august 2006 sendast til

Føroya Shell
Viðarnes
100 Tórshavn
att.: Erling í Liða

SISERO 351800

www.shell.fo

BURGER KING

Starvsfólk
TIL BURGER KING Í SMS

**FULLA TÍÐ**

Søkt verður eftir fólki M/K sum er 18 ár ella eldri, til fulltíðar arbeiði. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

**SEND UMSÓKNINA TIL**

Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
Ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.